# Føroyskur tónleikur í fokus í Fraklandi

**ATLANTIC SOUNDSCAPES**

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




Í hesum døgum verður føroyskur rútmiskur tónleikur marknaðarførdur á meginlandinum í Evropa undir heitinum Atlantic Soundscapes. Konseptið Atlantic Soundscapes er somuleiðis týdningarmikið amboð, ið Uttanríkisráðið nýtir í sambandi við branding av Føroyum.

- Ynskja vit útlendingar at lurta eftir føroyskum tónleiki, er neyðugt, at føroyska tónleikavinnan lurtar eftir marknaðinum, sigur Jonhard Eliasen, føroyskur sendimaður í Brússel.

Hann sigur, at hesin tankin hevur verið avgerandi fyri marknaðarátøkini, arbeitt hevur verið við seinastu tíðina. Tónleika- og miðlavinnan í Týsklandi, Niðurlondum og Fraklandi hava havt avgerandi orðið at siga, tá ið tónleikabólkar úr Føroyum eru valdir at framføra í hesum londum. Sama er galdandi í sambandi við fløgur, sum eru ella verða útgivnar í næstum.





### Rávøruútflutningur

Avgerandi fyri møguleikarnar hjá føroyskari tónleikavinnu at skapa sær inntøkur á meginlandinum er, at eitt føroyskt undirstøðukervi verður bygt upp, ið kann beina føroyskan tónleik út á røttu støðini í Evropa - eisini tey virtuellu støðini á alnótini.

- Føroysku vinnuligu áhugamálini eru at sleppa so langt út eftir virðisskapanarketuni sum til ber. Hetta er neyðugt, skal framleiðslan hjá gávuríku tónleikarum okkara ikki enda sum rávøruútflutningur til útlendska vinnuídnaðinum at gera sær dælt av, sigur Jonhard Eliasen.

Tætt samstarv hevur verið millum TUTL og Uttanríkisráðið. Hetta samstarvið hevur havt við sær, at víðfevnt netverk er bygt upp millum TUTL og booking-feløg og aðrar partar innan tónleikavinnuna í Týsklandi, Fraklandi, Niðurlondum og øðrum londum við. Sáttmálarnir, sum TUTL í hesum sambandi hevur fingið í lag, skuldu givið TUTL munandi betri møguleikar til at veita dyggar tænastur til tónleikarar, sum hava førleika, dirvi og vilja at royna avbjóðingar á marknaðunum í Vesturevropu.



### Transmusicales

Frá 3. til 7. desember 2008 er TRANSMUSICALES festivalurin á breddanum í Rennes í Fraklandi. Vanliga koma umleið 40.000 áhoyrarar at lurta eftir tí nýggjasta, rútmiski tónleikaheimurin hevur at bjóða. Størstan týdningin hevur tó stóra tali av umboðum úr tónleikavinnuni, sum vanliga luttekur á festivalinum.

- TRANSMUSICALES hevur í ár 30-ára føðingardag. Festivalurin er kendur fyri at finna fram stórar stjørnur, áðrenn hesar eru kendar. Innan tónleikaheimin er Transmusicale at meta sum týðandi góðskumetari. Vísast kann á, at festivalin hevur gjørt sítt til at gera til dømis Björk, Nirvana og Portishead kend, vísir Jonhard Eliasen á.

TRANSMUSICALES hevur sett føroyskan tónleik við ORKA og Budam í brennidepilin á festivalinum, ið byrjaði mikudagin, og sum heldur áfram næstu dagarnar.

- Talan er um stórhending í føroyskari tónleikasøgu, sigur sendimaður Føroya í Brússel.

### ORKA og Budam

Í sambandi við festivalin hava plátufelagið Ici D`Ailleurs og TUTL gjørt avtalu um at útgeva fløguna hjá ORKA "Livandi Oyða" í Fraklandi, Týsklandi, Hálandi, Italiu, Japan og USA

Longu nú kann við vissu staðfestast, at føroyskur tónleikur og Føroyar fara at fáa víðfevnda umtalu í sambandi við Transmusicales. Stórar miðlafyritøkur eru áhugaðar í at gera sendingar og greinar í sambandi við framførðslurnar hjá ORKA og Budam, sum verða á festivalinum. Dømi um miðlar eru The Guardian, AFP, France 3, Libération, L'Express, TF1 og Canal B. Týðandi fyritøkur sum t.d. EMI, Rolling Stone Magazine og Glastonbury Festival hava tryggjað sær pláss til framførslurnar hjá ORKA og Budam. Umboð frá tónleikavinnuni úr t.d. Frankaríki, Bretlandi, Ruslandi, Canda, Mexico, Brasilien, Schweiz, Spaniu, Letlandi, Belgien og Luxembourg hava boðað frá luttøku á konsertunum, sum ORKA og Budam standa fyri.

Jonhard Eliasen sigur, at avtalan millum Transmusicales og teir báðar føroysku tónleikabólkarnar kom í lag, tá ið bólkarnir framførdu á Atlantic Soundscapes tiltakinum í Brússel í mai 2008.

- Umboðini frá Transmusicales gjørdust hugtikin av sermerkta føroyska tónleikinum. Úrslit, sum spurdist burturúr hesum, varð, at ORKA verður høvuðsnavn á festivalinum. Herumfarmt verður Budam eisini sera sjónligur. ORKA og Budam skulu framføra í konsertsalinum L'Aire Libre dagliga, meðan festivalin stendur við, sigur Jonhard Eliasen.

ORKA fer øll fimm kvøldini at spæla saman við navnframa franska tónleikaranum, Yann Tiersen, og er millum annað hetta við til at tryggja stóran áhuga fyri ORKA.

### Móttøka

Uttanríkisráðið skipar á Transmusicales fyri móttøku, har umboð fyri tónleikavinnuna og miðlar úr ymsum londum eru boðin við. Roynt verður í hesum viðfangi at tryggja luttøku, sum hevur týdning fyri føroyska tónleikavinnu og branding av Føroyum sum heild. Tiltakið verður leygardagin 6. desember.

Portalurin fer at fylgja tiltakinum um vikuskiftið.